43




44

Green Gate Incoming







**Prísur úr 8.490,- fyri 7 nætur** – fyri hvønn í dupultkamari
**Prísur úr 9.220,- fyri 7 nætur** – fyri hvønn í einkultkamar

Børn 0-2 ár úr 785,- Børn 2-11 ár úr 5995,-

**Íroknað í tíðarskeiðnum 01-12 /2010 til 31-03/2011 er:**
Flog: Vágar – Keypmannahavn – Tunis t/r við avgjøldum. Innivist 7 nætur við morgunmati á 5*Hotel Sindbad og 1/2 pensión (vel millum frokost buffet ella døgurða við trimum rættum). Transfer av flogvøllinum í Tunis til Hotel Sindbad í Hammamet t/r. Danskur ferðaleiðari við komu og fráferð til Tunis.

**Ikki íroknað pakkaferðirna er:**
Trygging og gisting í Keypmannahavn í samband við fráferð og heimkomu.

**Fá nærri at vita á www.greengate.fo**

Jónas Broncksgøta 35 | FO-100 Tórshavn | The Faroe Islands | Tel +298 350 520 | info@greengate.fo | www.greengate.fo

# Gott jólalag í Alvalon




*Eisini dreingirnir sleppa upp í part. Her eru teir báðir, Brandur og Bjarni í ferð við at klippa stjørnur til vindeyguni á stovuni*




*Í Alvalon í Sørvági gera tey nógv burtur úr á jólum. Her eru genturnar Turið, Maria, Fríða og Kristina í holt við at klippa nakrar nissur*

**Sørvágur:** Tað eru fýra ár síðani stovnurin Alvalon læt upp, so vit hava fingið eina tradition hvat vit gera til jóla. Fast er at vit klippa, baka piparnøtur, og vit hava jólahugna fyri foreldrunum.

Tá vit eru komin inn í november mánað byrja vit at venja jólaleikir, vit hava fast jólaleikin "Jólalag" sum eitt av okkara starvsfólkum hevur skrivað til okkum.

Í Alvalon eru tríggjar barnagarðsstovur. Tær samstarva við at venja teir tríggjar leikirnar, sum vit framvísa til jólahugnan fyri foreldrunum - tey 3 ára gomlu børnini ganga Lucia; tey 4 og 5 ára gomlu børnini spæla "Jólaleik", og tey 6 ára gomlu børnini spæla leikin "Lítla Marin droymdi".

Fast er eisini, at vit dansa um jólatræið, og royna at syngja sooo hart, at vit vekja okkara tríggjar jólamenn sum hava sovið uppi á loftinum. Men hvussu koma hesir góðu jólamenn niður av loftinum?

Jú, vit hava ein stóran stiga liggjandi sum jólamenninir brúka til at koma niður við, og tit kunnu ætlað hvussu spent øll eru, um teir nú klára at ganga niður gjøgnum stigan uttan at detta. Tíbetur hava teir klárað at koma niður úr loftinum hvørt ár, uttan at bróta seg sundur, og tað besta av øllum er, at teir hava nógvar góðar pakkar við sær til øll børnini.

Vit fara eisini í kirkju við børnunum, har hoyra vit jólaevangeliið sum er gjørt til ein lítlan leik. Hendan dagin eta vit øll jólafrokost saman, bæði stór og smá, eitt sjálvtøkuborð við alskyns mati sum stendur klárur, tá vit koma aftur í barnagarðin.